# Kunnandi fundur um ættleiðing

**Tann 21. februar verður kunnandi fundur um ættleiðing av útlendskum børnum. DanAdopt skipar fyri, men tað er ríkisumboðið, sum góðkennir foreldur**

ÆTTLEIÐING
*Ingi Rasmussen*

Hvørt ár verða umleið 10 føroysk foreldur góðkend sum skikkað til at ættleiða børn uttan úr heimi. Tað er ríkisumboðið, sum góðkennir foreldrini, og haðani verður upplýst, at tað ofta gongur umleið hálvt annað ár, frá tí at foreldur eru góðkend, til børnini koma heim.

Í næstum bjóðar DanAdopt føroyingum til kunnandi fund um tað at ættleiða útlendsk børn. Fundurin verður hildin á Hotel Hafnia fríggjadagin 21. februar klokkan 16-21. Hann er fyrst og fremst ætlaður teimum, sum enn ikki hava tikið avgerð, um tey ætla at ættleiða, men øll eru vælkomin, upplýsir ríkisumboðið.

Á fundinum verður greitt frá søguni hjá DanAdopt, sum hevur hjálpt við ættleiðing í 30 ár. Endamálið hevur verið at hjálpa børnum uttan familju til at fáa eina familju í Danmark, Føroyum ella Grønlandi undir tryggum umstøðum.

Á fundinum fáast eisini royndir, sum onnur hava havt við at ættleiða børn uttan úr heimi. Farið verður stig fyri stig ígjøgnum gongdina, tá børn verða ættleidd, og serligur dentur verður lagdur á, hvussu tú velur tað landið, barnið skal koma úr, hvørji børn eru í uppskoti, og hvussu tú fært barnið heim. DanAdopt greiður frá, hvussu tey kunnu hjálpa, og hvørjar tænstur tey veita.

Nógv verður gjørt burturúr at greiða frá, hvørji børnini eru, hvaðani tey koma, hvussu teirra umstøður hava verið, og hvat hendir við teimum børnum, sum ikki eru egnað til ættleiðing.

Fundurin er ókeypis, men DanAdopt vil gjarna hava at vita hvussu nógv koma. Ring 45 81 63 33 millum klokkan 9 og 14, ella send e-mail til ims@danadopt.dk. Á heimasíðuni www.danadopt.dk fæst eisini meira at vita.

Betri tænasta til okkara vinnukundar.



Jógvan Jóhan Petur Lennard



- Øll vanlig eftirlit verða ókeypis næstu fýra árini ella upp til koyrdar 100.000 km., tað vil siga fyrstu koyrdar km. 25.000, 50.000, 75.000 og 100.000.
- Møguleiki skal verða fyri at fáa eftirlit, oljuskift og dekkskifti gjørt mikukvøld, soleiðis at bilurin er klárur aftur hósmorgun.
- 20% í avsláttri uppá allar eykalutir, dekkkeyp og oljuskift.
- Í samband við dekkskifti fáa tygum møguleika fyri at goyma reserva-dekkini á okkara nýggja dekkhotellið.

Ford

P/F Wenzel

Tað loysir seg at verða vinnukundi hjá okkum.
www.wenzel.fo, Akranesgøta 5, tlf. 354500.

# Politisku mørkini kámast

**Nýggir møguleikar hómast í politisku havsbrúnni, um ein semja fæst um yvirtøkulógina hjá løgmanni. Tað halda tveir samfelagsfrøðingar, sum Útvarp Føroya um vikuskiftið prátaði við.**

YVIRTØKUR
*Ingi Rasmussen*

Sjálvstýrispolitisku mørkini kámast í Føroyum, og tað letur upp fyri nýggjum møguleikum.

Løgmaður og forsætisráðharrin nærkast einari semju um, hvussu farast skal fram í yvirtøkupolitikkinum frameftir. Enn er onki endaligt komið á borðið, men løgmaður hevur skotið upp, at øll málsøkini uttan fyri heimastýrislógina verða yvirtikin við einari yvirtøkulóg, meðan heimastýrislógin heldur fram sum higartil við sínum A- og B-málum.

Samstundis verða uttanríkismál, verjumál og ríkisborgararættur tann karmurin um ríkisfelagsskapin, sum framvegis heldur okkum saman við Danmark.

Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, hevur tikið væl ímóti uppskotinum hjá Anfinni Kallsberg løgmanni, og allir flokkar á løgtingi tykjast kunna semjast um hendan leist. Semjan kemur at standa sína roynd, tá ítøkiligu yvirtøkurnar skulu fremjast, men eydnast tað at finna eina breiða semju um sjálvstýrispolitikkin, so lata nýggir møguleikar seg upp.

Yvirtøkulógin kann gerast eitt nýbrot í føroyskum politikki, heldur Gestur Hovgaard, samfelagsfrøðingur, sum starvast á Granskingardeplinum fyri økismenning. Tað kann lata upp fyri nýggjum politiskum samstarvi um høgravinstra ásina, um spurningurin um samband og loysing, sum hevur verið stríðsevnið síðstu fimm árini, fer í bakgrundina. Hann sær kortini onga nýggja samgongu fyri sær í løtuni.

Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingur, heldur beinleiðis, at samgongan kann styrkjast, um ein breið semja fæst um sjálvstýrismálið. Samgonguflokkarnir hava framvegis fullveldi sum felags mál, og tað fer at halda henni saman, hóast allir flokkar fylkjast um ein meiri hóvligan yvirtøkuleist.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

PRIX

NR. 23 • TÝSDAGUR • 4. FEBRUAR 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

**2. umfar**

Leygarkvøldið var annað innleiðandi umfar í Prix Føroyum hildið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bólkarnir spældu í hesi røð:
Mind's Eye
Déjá Vu
onkikanndiskuterast.alt kann
Speaker
Holgar & Villmenn

10 dómarar mettu um avrikini á pallinum, og teir dømdu út frá fimm ymiskum krøvum um millum annað tónleikaliga dygd, spæl og framførslu.

Déjá Vu var nummar 1 og vann sær pláss í finaluni. Mind's Eye var nummar 2 og skal spæla í eini hálvfinalu saman við fýra øðrum bólkum, har besti bólkurin fær eitt finalupláss.



– Hatta var fantastiskt. Fólkini vóru ótrúlig, og eg vildi næstan ikki fara av pallinum aftur, segði Eyðun Mortensen, sangari í Mind´s Eye

Mynd: Jens Kr. Vang

# Teir tóku øll á bóli

**Mind's Eye rakti bull's-eye, tá ið teir spældu alment fyri fyrstu ferð. Hetta var vell, sigur sangarin, sum var miðdepilin í bólkinum. Teir endaðu næstfremst leygarkvøldið**

DEBUT
*Eyðun Klakstein*

Tað var serliga ein bólkur, sum tók áhoyrararnar á bóli í 2. umfari av Prix Føroyum.

Ungu menninir í Mind's Eye spældu fyri fyrstu ferð alment, og tað var vorið sum frumframførsla. Tað eru ár ímillum, at ein nýggjur bólkur kemur fram á slíkan hátt – við einum orkufullum og fangandi úttrykki, við sjálvsáliti og dygd.

– Passar tað, at hatta er fyrstu ferð, teir spæla alment, spurdi ein tónleikari, sum var bilsin av framførsluni hjá Mind's Eye.

Talan var um rocktónleik av tí harða slagnum, men talan var um støðug skift millum melodiøs petti og tað, tey rópa growl.

Sangarin var í miðdeplinum alla tíðina, og hann kom sera væl frá síni framførslu. Hann var eisini ovurfegin, tá ið hann kom av pallinum aftur.

– Hatta var fantastiskt. Fólkini vóru ótrúlig, og eg vildi næstan ikki fara av pallinum aftur, segði Eyðun Mortensen.

## Flippaði út

Eitt døgn aftaná hálva sigurin í Fuglafirði, var sangarin framvegis sera fegin um avrikið leygarkvøldið.

– Tað følist framvegis fantastisk. Vit høvdu als ikki roknað við, at tað fór at ganga soleiðis, sigur Eyðun Mortensen.

Hvat var tað, sum tit ikki høvdu roknað við?

– Fyri tað fyrsta, at vit gjørdust nummar 2, tað høvdu onga vón um frammanundan. Og so var móttøkan frá áhoyrarunum nógv betur, enn vit høvdu torað at droymt um.

Nógvir klaksvíkingar vóru komnir um fjørðin at fylgja lokalu vónini, og tey gjørdu sítt til, at framførslan gjørdist lívlig bæði á pallin og á gólvinum í salinum.

– Beinan vegin tá ið vit komu á pallin, byrjaðu fólk at rópa og skríggja. Áðrenn vit høvdu spælt ein tóna, kókaði tað frammanfyri pallin. Tað var vell, sigur Eyðun Mortensen.

– Tað fekk okkum eisini at spæla væl, og eg havi ongantíð áður flippa soleiðis út, sum eg gjørdi leygarkvøldið. Tað vóru áhoyrararnir, sum fingu meg til tað.

Sangarin í Mind's Eye bæði sang og growlaði, og hann gjørdi tað sannførandi, men tað liggur eisini nógv venjing aftanfyri evnini at syngja soleiðis.

– Tað skal nógv venjing til fyri at kunna growla. Eg havi sungið til fløgur í fleiri ár á kamarinum hjá mær.

## Uppgávur bíða

Mind's Eye hevur verið virkin bólkur í fleiri ár, men teir hava ikki spælt alment fyrr enn leygarkvøldið. Teir hava vant nógv og hava hugnað sær við tónleiki í venjingarhølunum.

Tá ið teir fyri hálvum ári síðani fingu nýggj venjingarhøli, eftir at teir høvdu leitað í langa tíð, kom rættiliga ferð á hjá teimum. Teir hava keypt sær nógv góða útgerð, og teir eru farnir at skriva sín egna tónleik. Prixið hevur eisini skumpað meira undir teir.

– Aftaná framførsluna leygarkvøldið fingu vit onkran fyrispurning um at koma at spæla í næstum. Møguliga fara vit at spæla longu fríggjakvøldið aftur, sigur Eyðun Mortensen.

## Hava fingið eina vón

Mind's Eye hevur skrivað tónleikin hjá sær serliga til Prixið. Sangarin hevur skrivað tekstirnar, og so hava teir gjørt tónleikin í felag.

– Vit brúktu ikki rættiliga alla tíðina, sum vit til taks á pallinum, so vit ætla at taka okkurt nýtt við til hálvfinaluna. Vit hava fingið eitt gott hugskot, sum vit fara at arbeiða við næstu tíðina, sigur Eyðun Mortensen.

Fimm bólkar fara í mars mánaði at kappast í hálvfinaluni. Allir 2'arnir í innleiðandi umførunum fáa møguleikan at vinna seinasta finaluplássið.

– Áðrenn hetta umfarið høvdu vit ongar vónir um at koma víðari, men nú eru vit farnir at trúgva upp á tað, og vit hava eisini eina lítla vón um, at vit kunnu standa okkum væl í hálvfinaluni. Eg rokni í øllum førum við, at vit kunnu betra okkum til næsta umfarið, sigur sangarin í Mind's Eye.